FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Tórshavn, tann: 28. mars 2023
J.nr.: 23/0397

Fylgiskjal 2

Ummælisskjal

viðvíkjandi uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap

Uppskot til broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (**Veiðigjaldslógin**) varð lagt til hoyringar tann 9. mars 2023. Freistin at koma við viðmerkingum var 16. mars 2023.

Hoyringarsvar eru komin frá:

- Føroya Reiðarafelag
- Framherja vegna verksmiðjutrolararnar
- JFK Trol P/F
- Felagnum Línuskip
- Jupiter P/F
- Felagnum Nótaskip
- Føroya Skipara- og Navigatørfelag
- Vørn
- Kommunufelagnum
- Fuglafjarðar kommunu
- Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
- Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum

Niðanfyri er ein samandráttur av hoyringarsvarunum frá ymisku pørtunum. Viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum eru skrivaðar við skákskrift. Hoyringarsvarini í fullum líki eru viðløgd sum fylgiskjal til hetta ummælisskjal.

Gjørdar eru nakrar broytingar og nærri útgreiningar í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Ásett verður, at kommunurnar fáa part av veiðigjaldinum.

Hoyringarpartarnir hava gjørt vart við, at veiðigjaldið á botnfisk í Barentshavinum er ov høgt, og at broytingin er ov ógvuslig. Veiðigjaldið á botnfiski í Barentshavinum er lækkað í mun til uppskotið, sum varð sent til hoyringar. Broytingin stendur í talvu 1A og 1B.

Hátturin at gera upp avreiðingarvirðið á lodnu er broyttur, og onnur freist er fyri innkrevjing. Lógaruppskotið tekur atlit til tey serligu viðurskifti, sum eru fyri fiskiskap eftir lodnu.

Yvirskipað

Hoyringarpartarnir hava víst á, at freistin at svara er ov stutt.

Fíggjarmálaráðið:
Tað er ikki møguligt at leingja freistina, um broytingin skal hava gildi fyri veiðu landað frá 1. august og árið út. Lógaruppskotið ávirkar ikki veiðigjald fyri veiðu landað fyri 1. august 2023.

Føroya Reiðarafelag

Føroya Reiðarafelag vísir á, at landið ongan váða tekur á seg, men leggur allan váðan á vinnuna.

Víst verður á, at verandi skipan kom í gildi 2022 og hevur tí bert virkað í eitt ár, og at tað er vánaligur vinnupolitikkur, at karmar og fortreytir fyri eina vinnu javnan verða broyttar eftir hvørt løgtingsval.

Fíggjarmálaráðið:

Yvirskipað ber til at siga, at ein meira progressiv skipan við hægri veiðigjaldi enn í dag, tá prísurin er høgur, økir ikki um váðan í vinnuni. Endamálið við uppskotinum er at dagføra verandi veiðigjøld. Mett verður, at virðið á veiðirættindunum er størri, enn tey gjøld, sum eru í dag.

Føroya Reiðarafelag ger vart við, at verandi tilfeingisrentan i fiskivinnuni ikki er varandi økt seinasta árið og vísir m.a. til hækkandi oljuprísir, rentu o.a. rakstrarútreiðslur sum grundgeving.

Fíggjarmálaráðið:
Orsøkin til lógaruppskotið er ikki, at tilfeingisrentan er varandi økt, men at rúm er fyri at hækka veiðigjaldið, uttan at taka ein órímiligan part av tilfeingisrentuni. Hóast tað í dag ikki ber til at áseta tilfeingisrentuna við teimum upplýsingum, sum eru tøkir, ber kortini til at meta, at verandi veiðigjøld eru væl minni enn tilfeingisrentan. Mett verður, at veiðigjaldið er væl lægri enn tilfeingisrentan, sum Búskaparráðið lat gera við støði í roknskapum fyri 2017, eisini tá hædd verður tikið fyri hægri hýru, enn upprunaliga varð nýtt. Veiðigjaldið er somuleiðis væl lægri enn uppboðssølugjaldið, ið varð latið fyri 8-ára rættindi, sum vórðu seld á uppboði í 2018 og 2019.

Stórar íløgur eru gjørdar í nýggj skip, ið skulu rindast aftur yvir stutt áramál. Í hesum sambandi vísir Føroya Reiðarafelag á, at høgi prísurin fyri fiskaúrdrátt á heimsmarknaðinum fyri stóran part fer til manningina, og at hetta gevur hægri skattainntøkur, bæði í lønarskatti og avgjøldum.

Fíggjarmálaráðið:
Í metingini er hædd tikin fyri ávirkan á skattainntøkur. Hetta er lýst undir fíggjarligar avleiðingar. Býtið millum reiðarí og manning er ikki avgerandi fyri, hvør partur av tí serstaka vinningi, sum vinnulig serrættindi hava við sær, eigur at falla til landið.

Føroya Reiðarafelag metir, at tey veiðigjøld, sum undanfarnu árini eru løgd á vinnuna, eru ein stórur váði, sum verður lagdur afturat teimum váðum, ið vinnan frammanundan virkar undir. Tað er tí misvísandi, tá Fíggjarmálaráðið staðfestir í almennu viðmerkingunum, at skipanin virkar væl. Føroya Reiðarafelag tekur ikki undir við niðurstøðuni hjá Fíggjarmálaráðnum, at verandi skipan virkar væl, tí skipanin hevur framvegis stórar váðar og óvissur.

Fíggjarmálaráðið:
Yvirskipað metir Fíggjarmálaráðið, at verandi skipan virkar væl, tí hon er einføld, løtt at umsita og vinnan veit, hvat veiðigjaldið er, tá farið verður til fiskiskap. Skipanin hevur hesar fyrimunir framum t.d. eina uppboðssølu. Mett verður somuleiðis, at skipanin eggjar til effektivisering, tí gjald verður lagt á tilfeingi, heldur enn at virka sum ein skattur. Avbjóðingin við hesi skipan er at stilla gjaldið rætt, so

tað tekur ein rímiliga part av tilfeingisrentuni. Av hesi orsøk ásetir lógaruppskotið eitt gjald, sum er væl minni enn tær metingar, sum higartil eru gjørdar av tilfeingisrentuni.

Føroya Reiðarafelag heldur, at landið eigur at vísa størsta varsemi, tá ið gjøld verða hækkað, tí veiðigjaldið verður roknað við støði í umsetninginum hjá skipunum, og skipanin gevur onga trygd fyri, at skip ikki hava undirskot orsakað av veiðigjøldum.

Fíggjarmálaráðið:
Veiðigjaldið verður mett at vera væl lægri enn tilfeingisrentan. Eftir hesum fortreytum gevur skipanin trygd fyri, at væl rikin skip yvir tíð geva eitt munandi avkast við verandi veiðigjøldum.

Føroya Reiðarafelagið metir, at tilfeingisrentan er minkað seinastu árini, tí talið av skipum í uppsjóvarflotanum er økt úr 10-12, fyri nøkrum árum síðani, til at í dag eru 17.

Fíggjarmálaráðið:
Økta talið av skipum kann alt annað líka minka um tilfeingisrentuna. Mett verður, at rúm er fyri at hækka veiðigjaldið, uttan at taka ein órímiligan part av tilfeingisrentuni, eisini við øktum tali av skipum.

Føroya Reiðarafelag vísir á, at skipini skulu hava møguleika at hava eitt munandi yvirskot, tá ið kvoturnar eru stórar og fiskiskapurin góður. Tað er eingin trygd fyri, at skip hava yvirskot, hóast prísurin er góður, tí nógv onnur viðurskifti skulu ganga eftir vild.

Fíggjarmálaráðið:
Í arbeiðinum at evna verandi veiðigjaldslóg, var semja um ikki at áseta veiðigjald út frá ov nógvum ymiskum viðurskiftum, sum eru støðugt broytandi, t.d. olja og renta, og sum ofta hava hvør sín virknað. Til dømis vísir Føroya Reiðarafelag í hoyringarsvari sínum á, at høgi prísurin í løtuni lutvíst skyldast inflatión. Fyrimunurin við verandi skipan er, at hon er gjøgnumskygd og einføld at umsita. Avgerandi fyri, um skipini hava munandi yvirskot, er, at gjaldið er rímiligt í mun til mettu tilfeingisrentuna. Fíggjarmálaráðið metir, at veiðigjøldini bert taka ein part av tilfeingisrentuni, og tí er rúm fyri at halda fast í verandi einføldu skipan, og at væl rikin skip kunnu fáa munagóðan vinning.

Føroya Reiðarafelag metir, at nærum 60% av vinninginum endar hjá landinum og 40% hjá reiðaríunum. Hetta býtið eigur ikki at verða skeiklað meira, og ongar grundgevingar eru fyri tí. Føroya Reiðarafelag vísir á, at nýggj uppsjóvarskip kosta umleið 300-400 mió. kr. Tað krevur tryggar karmar og peningasterkar fyritøkur, um hesar íløgur skulu gerast, og tí er neyðugt at reiðaríini hava møguleika at varðveita ein munandi part av avlopinum. Víst verður á umhvørvisatlit og effektivitet. Nýggj skip dálka minni, hava minni útlát, oljunýtslan er minni fyri hvørt fiskað kilo, og betri køling veitir betri góðsku til virkini.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur: *"Tað, at gjøldini hækka, so at størri partur av tilfeingisrentuni fellur til landið, ger at kravið til vinnuna um effektivitet og góð veiðutól økist. So hóast uppskotið viðførir ein fíggjarligan kostnað fyri vinnuna, vil tað ikki steðga vinnuni í at gera skilagóðar íløgur. Heldur tvørturímóti."*

Føroya Reiðarafelag metir ikki, at hetta sjónarmið er rætt og saknar eina grundgeving fyri hesum. Teirra meting er, at hægri veiðigjald minkar um hugin og møguleikan at gera íløgur.

Fíggjarmálaráðið:
Tryggir karmar og sterkt kapitalgrundarlag er ein avgerandi fortreyt fyri eini vælvirkandi og effektivari fiskivinnu, sum ger neyðugar íløgur. Neyðugt er tí at áseta veiðigjaldið nóg lágt til, at reiðaríini hava møguleika at varðveita ein munandi part av avlopinum. Mett verður, at lógaruppskotið tekur ein munandi, men rímiligan part av serstaka vinninginum, sum serrættindi hava við sær. Er veiðigjaldið ov lágt, hevur tað hinvegin við sær, at skip, sum ikki hava effektivan rakstur, hava møguleika at halda

fram. Er veiðigjaldið rætt ásett, vil tað ikki steðga vinnuni í at gera skilagóðar íløgur. Heldur tvørturímóti.

Føroya Reiðarafelag vísir á, at arbeiðsbólkurin, sum tók lut í arbeiðinum at evna verandi veiðigjaldslóg, ikki tók undir við at leggja veiðigjald á heimaflotan.

Fíggjarmálaráðið:
Arbeiðsbólkurin, sum var mannaður við umboðum fyri vinnu og fyrisiting, gjørdi felags niðurstøðu, at sum meginregla eigur sama gjald at verða rindað fyri sama fiskaslag, fyri at gjaldið ikki skal vera vinnuliga skeiklandi og ikki skal virka sum ein eyka skattur. Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at henda niðurstøða ikki merkir, at arbeiðsbólkurin ítøkiliga hevur tikið støðu til, um sama veiðigjald skal leggjast á heimaflotan sum á aðrar skipabólkar. Fíggjarmálaráðið hevur rættað viðmerkingarnar.

Føroya Reiðarafelagið metir, at grundgevingarnar fyri at hækka veiðigjaldið byggja á grunnar greiningar, og at møguligar avleiðingar als ikki eru viðgjørdar í viðmerkingunum. Uppskotið greiðir bara frá hækkingunum, sum henda í 2023, og ger hetta, at avleiðingarnar tykjast meira hóvligar og vandaleysar. Uppskotið leggur upp til ógvusligar hækkingar í øllum gjøldum.

Fíggjarmálaráðið:
Lógaruppskotið vísir greitt, hvat gjaldið verður frá 1. august 2023, og hvussu tað stigvíst hækkar, og hvat veiðigjaldið at enda verður, frá 2026 at rokna. Hækkingarnar metast at vera væl lægri enn tilfeingisrentan, og tí metir Fíggjarmálaráðið, at avleiðingarnar yvirskipað eru nóg væl lýstar.

Føroya Reiðarafelag metir, at einki samband er millum tann prís, sum nótaskipini rinda fyri at veiða makrelrættindini, sum heimaflotin hevur fingið tillutað, og tilfeingisrentuna. Viðmerkingarnar siga: *"Mett verður, at ein størri tilfeingisrenta er knýtt at rættindunum til at veiða makrel, sum ítøkiliga kemur til sjóndar gjøgnum teir handlar, har sonevndi heimaflotin selur makrelrættindi til nótaskip."*

Føroya Reiðarafelag metir, at hesar viðmerkingar eru misvísandi, tí tá ið uppsjóvarskip hava fiskað eina kvotu fyri trolarar og línuskip, havi summi reiðarí ynskt at geva manningini í heimaflotanum hýru burturav hesum avreiðingarvirði. Summi uppsjóvarskip kunnu gera hetta einstakar túrar fyri at stuðla teimum manningum í heimaflotanum, sum ikki hava høga hýru. Tí kann prísurin, sum nótaskipini lata heimaflotanum fyri at fiska makrelkvotu, als ikki tulkast sum virðið á rættindum ella eitt mát fyri tilfeingisrentu. Fíggjarmálaráðið hevur misskilt samanhangin millum tað, sum goldið verður fyri kvotuna, og tað virðið kvotan hevur fyri keyparan.

Fíggjarmálaráðið:
Tað er ikki møguligt við teimum upplýsingum, sum í dag eru tøkir, at gera eina nóg neyva meting av, hvat tilfeingisrentan er. Mett verður kortini, at tann prísur, sum tillutaðar kvotur verða keyptar fyri, í hvørt fall geva ein ábending um tað virðið, sum kvotan hevur fyri keyparan. Fíggjarmálaráðið er samt í, at onnur atlit kunnu ávirka prísin, t.d. at eigarar av nótaskipum ynskja at stuðla manningum í heimaflotanum, sum ikki hava høga hýru. Eisini kann tað ávirka prísin, at ávíst samanfall er millum eigaraskaran í ymisku skipabólkunum, ið ger, at prísurin ikki fylgir meginreglunum um armslongd. Hetta merkir kortini ikki, at síggjast kann burtur frá tí prísi, sum kvotur verða seldar fyri, tá metast skal um, á hvørjum støði veiðigjaldið eigur at liggja.

Føroya Reiðarafelag vísir á, at veiðigjaldið er væl hægri í Føroyum enn í grannalondunum, og at kappingarførið hjá føroysku fiskivinnuni er í vanda. Í grannalondunum eru stuðulsskipanir settar í verk at stuðla undir tilgongdina at leggja um til grønari orkukeldur og orkusparing. Ein ógvuslig hækking í veiðigjaldinum køvir áhugan at gera slíkar íløgur.

Fíggjarmálaráðið:
Lógaruppskotið ásetir eitt veiðigjald, sum verður mett at verða lægri enn tilfeingisrentan, og sum gevur reiðaríunum møguleika at hava munandi avlop, eisini til at gera neyðugar íløgur. Eftir hesum fortreytum er tað ikki avgerandi, hvat veiðigjaldið í øðrum londum er.

Føroya Reiðarafelag metir ikki, at tað er rímiligt, at veiðigjaldið hækkar í 2026, tá uppboðsølukvotur í 2026 og 2027 fara frá at rinda veiðigjald. Uppboðssølan var miseydnað, tí kappingin um kvoturnar hevur ført til ein alt ov høgan prís. Sum dømi verður nevnt at landið seldi sildakvotur fyri umleið 90% av avreiðingarvirðinum í 2018. Reiðarafelagið heldur, at stigin, sum verður settur inn frá 2026, eigur at strikast.

Fíggjarmálaráðið:
Veiðigjaldið verður ásett soleiðis, at samlaða inntøkan frá veiðigjaldinum ikki minkar, tá uppboðsølukvotur í 2026 og 2027 fara frá at rinda veiðigjald. Veiðigjaldið er væl lægri enn uppboðssølugjaldið, ið varð latið fyri 8-ára rættindi, sum vórðu seld á uppboði í 2018 og 2019. Meginregluliga metir Fíggjarmálaráðið ikki, at kapping gevur ov høgan prís.

Føroya Reiðarafelag heldur, at uppskotið fyri Barentshavið er ov ógvusligt. Tað er ein tvífalding av gjaldinum í mun til í dag, og grundgevingin er ikki saklig. Tað er ikki rætt at knýta ásetingina av tilfeingisgjaldinum í Barentshavinum til tilfeingisgjøldini á pelagiska fiskiskapin undir Føroyum. Heldur eigur ein heildarmeting at gerast, og tilfeingisgjøld skulu grundast á eina meting av tilfeingisrentuni á fiskatilfeinginum, sum reiðarar hava fingið rættindi frá landinum at troyta. Hendan greining er ikki gjørd. Ein samanbering av veiðigjøldum og lønarskatti vísir hinvegin, at landið hevur vinning av avtaluni.

Mett verður, at fleiri viðurskifti eiga at verða tikin við, tá ið uppskotið verður viðgjørt m.a. at gjaldið verður meira enn fýrafaldað, síðan sáttmálarnir vórðu undirskrivaðir, at skipini rinda 25-30 mió. kr. tils. í veiðigjøldum í norskum og russiskum sjógvi, og at renta og avdráttir eru økt nógv hjá hesum skipum. Tað fer at økja avkastkravið við meira enn 50 mió. kr. bara fyrsta árið. Víst verður somuleiðis á, at virðið á nýggja flotanum er 1,2 mia. kr.

Fíggjarmálaráðið:
Veiðigjaldið á botnfiski í Barentshavinum er lækkað í mun til uppskotið, sum varð sent til hoyringar. Atlit verður við hesum tikið til, at varsemi má vísast í mun til mettu tilfeingisrentuna.

Føroya Reiðarafelag ger vart við, at heimaflotin verður hart raktur av hesum uppskotinum. Undantakið frá at rinda veiðigjald fyri kvotur tillutaðar heimaflotanum hevur verið eitt týðandi ískoyti til raksturin, og hevur í ein ávísan mun verið við til at endurnýggja flotan.

Fíggjarmálaráðið:
Uppskotið hevur avleiðingar fyri heimaflotan. Endamálið er at avtaka vinnustuðulin, sum verður latin gjøgnum ókeypis kvotur, sum flestu skip í heimaflotanum ikki fiska, men selja til nótaskipini uttan veiðigjald. Avbjóðingarnar hjá heimaflotanum eru stórar, flotin gevur sum heild ikki avlop, og neyðugt er at gera tillagingar at betra um raksturin. Verandi stuðul er ikki egnaður til at røkka hesum endamáli, men hevur heldur við sær, at virksemi, sum ikki lønar seg og sum ikki er burðardygt, heldur fram.

At enda vísir Føroya Reiðarafelag á, at greiningin av tilfeingisrentuni, sum Búskaparráðið gjørdi við støði í roknskapum fyri 2017 ikki er eftirfarandi, m.a. tí metingin av kapitalapparatinum er ov lág og miðalløn og tal av ársverkum er mett ov lágt.

Fíggjarmálaráðið:
Veiðigjaldið er ikki ásett eftir tí tilfeingisrentu, sum áður er gjørd við støði í roknskapum fyri 2017. Lógaruppskotið ásetir eitt munandi lægri veiðigjald og tekur støði í verandi veiðigjøldum, sum ikki vera

mett at vera ov høg. Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at skal tilfeingisgjaldið verða ein størri partur av tilfeingisrentuni, er neyðugt við nýggjum upplýsingum.

Framherji vegna verksmiðjutrolararnar

Framherji vísir á, at veiðigjøldini á fiskiskapinum í Barentshavinum eru ivaleysa høg sum er. Víst verður á somu viðurskifti, sum Føroya Reiðarafelag hevur gjørt vart við:

- gjaldið er høgt samanborið við Grønland, Ísland og Norra,
- karmar og fortreytir verða broyttar alla tíðina
- óvissa og minni íløguhugur

Framherji metir, at ein so ógvuslig hækking í veiðigjaldinum á fiskiskapinum í Barentshavinum kann fáa álvarsamar avleiðingar fyri virksemi teirra, tá tað kann gerast trupult at fáa endarnar at røkka, um bara okkurt annað eisini gongur ímóti.

Fíggjarmálaráðið:
Veiðigjaldið á botnfiski í Barentshavinum er lækkað í mun til uppskotið, sum varð sent til hoyringar. Atlit verður við hesum tikið til, at varsemi má vísast í mun til mettu tilfeingisrentuna.

JFK Trol P/F

JFK metir, at veiðigjaldið í Barentshavinum uttan iva er sett ov høgt. Tað fer at seta nýggju íløgurnar, sum eru gjørdar, í vanda og tekur grundarlagið undir teimum íløgum, sum eru gjørdar, burtur.

Fíggjarmálaráðið:
Sum nevnt í viðmerkingunum til Føroya Reiðarafelagið og Framherja, er veiðigjaldið á botnfiski í Barentshavinum lækkað í mun til uppskotið, sum varð sent til hoyringar. Atlit verður við hesum tikið til, at varsemi má vísast í mun til mettu tilfeingisrentuna.

JFK metir, at broytingarnar, har stuðulin til heimaflotan verður tikin burtur, hava ein eykakostnað fyri reiðaríið upp á 9 mió. kr. Um veiðigjald, sum ætlað, verður lagt á heimaflotan fær tað avleiðingar fyri manningarnar á hesum skipum, sum ikki hava hægstu árligu lønirnar. Makrelpengar hava verið ein kærkomin upphædd hjá manningini og eru eitt týðandi íkast til raksturin hjá skipunum, soleiðis at tey hava kunnað hildið áfram at latið rávøru til Kósina og tey 150 fólkini, sum har virðisøkja botnfiskin undan Føroyum.

Fíggjarmálaráðið:
Uppskotið hevur avleiðingar fyri heimaflotan og avleidda virksemið. Endamálið er, sum nevnt í viðmerkingunum omanfyri, at avtaka vinnustuðulin, sum verður latin gjøgnum økeypis kvotur, sum flestu skip í heimaflotanum ikki fiska, men selja til nótaskipini uttan veiðigjald. Avbjóðingarnar hjá heimaflotanum eru stórar, flotin gevur sum heild ikki avlop og neyðugt er at gera tillagingar at betra um raksturin. Verandi stuðul er ikki egnaður til at røkka hesum endamáli, men hevur heldur við sær at virksemi, sum ikki lønar seg og sum ikki er burðardygt, heldur fram.

JKF heldur tað ikki vera rætt, at tilfeingisgjaldið í Barentshavinum verður ásett eftir, hvat møgulig býtiskvota gevur í veiðigjaldi í Føroyum, men endamálið eigur at vera, hvat veiðan hjá skipabólkinum kann gjalda. JFK hevur lagt fleiri útrokningar sum skjalprógv fyri hesum.

Fíggjarmálaráðið er samt í, at veiðigjaldið ikki bert eigur at verða ásett eftir, hvat møgulig býtiskvota gevur í veiðigjaldi í Føroyum, men at hetta kortini gevur eina ábending um tilfeingisrentuna.

Veiðigjaldið verður broytt samanborið við tað uppskot, sum varð sent til hoyringar. Við hesum verða atlit tikin til tey ivamál, sum hoyringarpartarnir hava víst á. Veiðigjaldið er væl minni enn metta tilfeingisrentan. Víst verður til talvu 3 í ávikavist skjali 1A og 1B.

Felagið Línuskip

Felagið Línuskip vísir á - eins og Føroya Reiðarafelag og JFK Trol P/F - at lógaruppskotið hevur stórar og neiligar avleiðingar fyri vinnuna.

Reiðaríini, sum reka línuskip, hava seinastu árini gjørt íløgur í nýggjari og betri skip, men framvegis hava líkindi ikki verið at bygt nýggj línuskip til føroyska flotan. Einki nýtt skip er bygt til eitt føroyskt reiðarí síðani 1988.

Markrelkvoturnar, sum línuskipini fingu í 2020, hava gjørt tað lættari at fáa manning og fígging til útskifting av fleiri skipum, sum vit hava sæð seinastu árini. Ætlanin um at heimaflotin skal rinda veiðigjald av makrelkvotunum hevur við sær, at tá manningarnar hava fingið sín part, verður at kalla einki eftir til reiðaríini. Ongin óvanligur vinningur er í bólki 3.

Felagið Línuskip vísir á, at manningar og reiðaríini høvdu líka fegin ynskt sær kvotur at fiska, heldur enn makrel at selja.

Tað hevur óhepnar avleiðingar fyri vinnuna at seta veiðigjald á makrelkvoturnar, sum heimaflotin fær tillutað, og síðan at seta brúksskyldu, um ikki landsstýrið megnar at útvega somu skipum nýggjar kvotur í staðin.

Fíggjarmálaráðið:
JFK Trol P/F og Føroya Reiðarafelag hava víst á líknandi sjónarmið. Fíggjarmálaráðið er samt í, at uppskotið hevur avleiðingar fyri heimaflotan og avleidda virksemið. Endamálið við uppskotinum er, sum nevnt í viðmerkingunum omanfyri, at avtaka vinnustuðulin, sum verður latin gjøgnum ókeypis kvotur, sum flestu skip í heimaflotanum ikki fiska, men selja til nótaskipini uttan veiðigjald. Avbjóðingarnar hjá heimaflotanum eru stórar, flotin gevur sum heild ikki avlop og neyðugt er at gera tillagingar at betra um raksturin. Verandi stuðul er ikki egnaður til at røkka hesum endamáli, men hevur heldur við sær, at virksemi, sum ikki lønar seg og sum ikki er burðardygt, heldur fram.

Felagið Línuskip mælir til at brúka neyðuga tíð til at lýsa sokallaðu tilfeingisrentuna, semjast um útrokningarhættir og at leggja einfaldar útrokningar til grund fyri møguligum tilfeingisgjøldum og støðugar karmar.

Fíggjarmálaráðið:
Verandi lóggáva er lutfalsliga einføld, løtt at umsita og vinnan veit, hvat veiðigjaldið er, tá ið farið verður til fiskiskap. Landsstýrið hevur ætlanir um at greina tilfeingisrentuna við støði í nýggjum tølum, men tað er ikki partur av hesum lógaruppskotinum.

Jupiter

Felagið mælir til ein progressivan tilfeingsskala ella botnfrádrátt, har avgjald t.d. ikki verður goldið av teimum fyrstu 30-40 mió. kr. í landingarvirði pr. skip. Smáu kvotahavarnir hava grundkostnað á hesum støði. Felagið vísir á, at smáu aktørarnir hava ongan yvirnormalan profit, og tí fer næstan 100% av yvirskotinum til tilfeingisgjøld.

Fíggjarmálaráðið heldur, at sama veiðigjald eigur at vera fyri sama fiskaslag fyri øll skip. Á hendan hátt eggjar skipanin til, at vinnan støðugt tillagar seg, so at fiskurin verður veiddur so væl og effektivt sum gjørligt.

Felagið metir, at í mesta lagi 20% av landingarvirðinum eigur at verða goldið í tilfeingisgjøldum.

Veiðigjaldið tekur ikki hædd fyri stóra kostnaðinum í vinnuni, m.a. olju og viðlíkahaldskostnað og víst verður á, at tað er ein trupulleiki, at manningarkostnaðurin liggur um 29% av landingarvirðinum eftir tilfeingisgjøld. Verandi skipan ger, at manningarfeløgini nærum kunnu krevja tað teimum listir, tí fiskiloyvi verður ikki latið uttan váttan um avtalu við manningarfelag.

Fíggjarmálaráðið:
Í fyrireikandi arbeiðinum til galdandi veiðigjaldslóg varð dentur lagdur á at hava eina einfalda skipan, sum ikki hevur fleiri viðurskifti, t.d. rentu og oljukostnað, ið ávirka veiðigjaldið. Endamálið er at hava eina einfalda skipan, sum tekur ein rímiligan part av tilfeingisrentuni. Ætlanin við hesum lógaruppskoti er ikki at gera fleiri grundleggjandi broytingar í skipanini, men at taka eitt rímiligt veiðigjald fyri øll fiskasløg og ikki at hava undantøk fyri ávísan skipabólk.

Spurningurin um manningarkostnað verður ikki viðgjørdur í hesum lógaruppskoti. Tað er tengt at avtalu millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

P/F Jupiter heldur ikki tað verða rætt bert at leggja høg gjøld á bíligastu fiskasløgini ímeðan dýru fiskasløgini einki rinda, m.a. skeljar og havtaska/svartkalvi.

Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at veiðigjald sum meginreglu eigur at verða goldið av øllum fiskasløgum. Nevndu fiskasløg verða tó ikki tikin við í hesum lógaruppskoti; tað krevur nærri viðgerð.

Felagið Nótaskip

Felagið Nótaskip vísir á, at veiðigjøldini eru ivaleysa høg, og tí eiga tey ikki at verða hækkað. Víst verður í høvuðsheitum á somu viðurskifti, sum Føroya Reiðarafelag, Framherji og JFK Trol hava gjørt vart við at:

- gjaldið er høgt samanborið við Grønland, Ísland og Norra
- tilfeingisrentan byggir á skeivar fortreytir
- tilfeingisrentan er minkandi m.a. vegna minni kvotur í framtíðini og økt tal av skipum
- óvissa og minni íløguhugur darvar effektiviteti og grøna orkuskiftinum
- ov høgur prísur varð latin fyri tær kvotur, sum vórðu keyptar á uppboðssølu, og hesar eigi tí ikki at verða nýttir sum grundarlag fyri ásetan av veiðigjaldi

Fíggjarmálaráðið er samt í, at neyðugt er at áseta veiðigjaldið nóg lágt til, at reiðaríini hava møguleika at varðveita ein munandi part av avlopinum, og at til ber at gera neyðugar íløgur. Mett verður, at uppskotið gevur væl riknum feløgum henda møguleika. Útlendsk veiðigjøld hava í sjálvum sær ikki týdning fyri, hvussu gjaldið í Føroyum verður ásett. Havast má í huga, at føroysk reiðarí eisini eru í kapping við aðrar vinnur um arbeiðsmegi og kapital. Mett verður, at lógaruppskotið tekur ein munandi, men rímiligan part av serstaka vinninginum, sum serrættindi hava við sær. Veiðigjaldið er,

sum nevnt, munandi lægri enn tær metingar, sum higartil eru gjørdar av tilfeingisrentuni. Við hesum varsemi eru atlit tikin til tey viðurskifti, sum Felagið Nótaskip vísir á.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag (FSN)

FSN tekur sum heild undir við tilfeingisgjaldi, tó ikki fyri heimaflotan. Felagið metir tó, at ætlaðu gjøldini eru sera høgt sett.

FSN metir, at uppskotið hevur rættuliga stóran avleiðingar fyri skiparar og manning, tí manningar rinda ein stóran part av veiðigjaldinum, men eiga einki í kvotuni. Felagið vísir á, eins og P/F Jupiter, at tað verður trupult at manna heimaflotan, um undantakið fyri heimaflotan verður strikað.

Mælt verður til, at gjøldini ikki verða lagt á 1. Lið, og at veiðigjøld ikki kunnu dragast frá søluvirðinum av veiðuni, tá hýrur verða gjørdar upp og goldnar manningini. Sum grundgeving vísir felagið á, at manningarnar onga ávirkan hava á sølu av fiskaða fiskinum, og at fiskurin ongantíð verður boðin til hægstbjóðandi. Annar skeivleiki er, at um reiðarin selur alt tilfeingið til 3. persón/felag, so fáa manningarnar einki burtur úr søluni.

Fíggjarmálaráðið er samt í, at uppskotið hevur avleiðingar fyri heimaflotan og avleidda virksemið, og kann í fyrstu atløgu gera tað truplari hjá nøkrum skipum at fáa manning. Endamálið við uppskotinum er, sum nevnt í viðmerkingunum omanfyri, at avtaka vinnustuðulin, sum verður latin gjøgnum ókeypis kvotur, sum flestu skip í heimaflotanum ikki fiska, men selja til nótaskipini uttan veiðigjald. Avbjóðingarnar hjá heimaflotanum eru sum nevnt stórar, flotin gevur sum heild ikki avlop, og neyðugt er at gera tillagingar at betra um raksturin. Verandi stuðul er ikki egnaður til at røkka hesum endamáli, men hevur heldur við sær at virksemi, sum ikki lønar seg, og sum ikki er burðardygt, heldur fram. Ætlanin við hesum lógaruppskoti er ikki at gera fleiri grundleggjandi broytingar í skipanini, men at taka eitt rímiligt veiðigjald fyri øll fiskasløg og ikki at hava undantøk fyri ávísan skipabólk. Spurningurin um viðurskiftini millum manning og reiðarí verður ikki viðgjørdur í hesum lógaruppskoti. Tað er tengt at avtalu millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Vørn

Vørn tekur undir við, at heystgýtandi sild verður fevnd av veiðigjaldinum. Tað lættir um umsitingina.

Undantakið fyri heimaflotan hevur verið orsøk til tulkingarósemju millum Vørn og eigara av fiskiførum í fiskidagaskipanini. Umsitingin av veiðigjøldum verður við lógarbroytingini munandi lættari hjá Vørn.

Fuglafjarðar kommuna

Fuglafjarðar kommuna er ikki samd við metingina hjá Fíggjarmálaráðnum, um at lógaruppskotið ikki hevur serligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum. Kommunan metir, at inntrivið er ógvuliga umfatandi.

Mett verður, at øktu veiðigjøldini fyri uppsjóvarflotan fara at geva 1,6 mió. kr. minni inntøku í kommunuskatti og 580 t.kr. minni í partafelagsskatti um árið. Fyri Barentshavflotan merkja øktu gjøldini 423 t.kr. í lægri skattainntøku og partafelagsskatturin kann væntast at verða 238 t.kr. lægri.

Tilsamans missir kommunan beinleiðis 2,84 mió. kr. árliga. Tá eru avleiddar vinnur ikki taldar við.

Kommunan mælir til ikki at gera slíkar broytingar í einum høggi uttan so, at kommunurnar, sum eru fyri missi, fáa endurgjald fyri inntøkumissin.

Fíggjarmálaráðið:
Lógaruppskotið ásetur broyting í veiðigjaldinum sum heild. Undir fíggjarligar avleiðingar eru avleiðingarnar fyri kommunurnar lýstar.

Tað kann ikki útihýsast, at ávís øki í landinum merkja hetta meira enn onnur, bæði tá prísurin er lágur - og veiðigjaldið tí verður lægri enn í dag - og tá prísurin er høgur - og veiðigjaldið verður hægri enn í verandi løgtingslóg. Yvirskipað ber til at siga, at tey øki í landinum, sum í dag hava størsta ágóðan av verandi býti av serstøku rættindunum, eisini merkja størstu avleiðingina av broytingunum. Talan er tó ikki um avleiðing, sum beinleiðis er tengd at ávísum øki, sum t.d. tá ein stovnur verður fluttur. Tí verður hildið fast við, at lógaruppskotið ikki hevur avleiðing fyri serstøk øki í landinum. Fíggjarmálaráðið ásannar tó, at avleiðingin fyri ávísar kommunur er størri enn fyri aðrar. Fíggjarmálaráðið tillagar viðmerkingarnar. Viðvíkjandi avleiðingunum fyri inntøkurnar hjá kommununum sum heild, verður víst til svarið til Kommunufelagið.

Kommunufelagið

Kommunufelagið vísir á, eins og Fuglafjarðar kommuna, at veiðigjald hevur beinleiðis ávirkan á kommunurnar. Seinastu árini hevur landið tikið inn umleið 240 mió. kr. árliga. Kommunurnar missa av hesi orsøk umleið 13 mió. kr. árliga vegna tøkugjaldið.

Kommunurnar fegnast um, at nýggja landsstýrið ætlar at lata kommununum ein part av tøkugjaldinum, men mælir til eina greiðari og einfaldari loysn, har bæði uppskotini verða broytt soleiðis, at kommunurnar altíð verða fíggjarliga skaðaleysar av gjøldunum. Hetta kann gerast við at áseta ein ávísan prosentpart av veiðigjaldinum til kommunurnar.

Fíggjarmálaráðið:
Lógaruppskotið verður broytt og ásett verður, at kommunurnar fáa part av veiðigjaldinum eins og fyri tøkugjaldið.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið heldur, at hóskandi hevði verið, at munandi broytt útreiðslustøði verður roknað inn í javningina av veiðigjaldinum.

Fíggjarmálaráðið:
Fleiri reiðarí hava gjørt vart við líknandi sjónarmið.

Í fyrireikandi arbeiðinum til galdandi veiðigjaldslóg varð dentur, sum nevnt, lagdur á at hava eina einfalda skipan, sum ikki hevur fleiri viðurskifti, ið ávirka veiðigjaldið t.d. rentu og oljukostnað. Endamálið er at hava eina einfalda skipan, sum tekur ein rímiligan part av tilfeingisrentuni. Ætlanin við hesum lógaruppskoti er ikki at gera fleiri grundleggjandi broytingar í útrokningarháttinum, men at taka eitt rímiligt veiðigjald fyri øll fiskasløg. Ofta – tó ikki altíð - er ein ávísur samanhangur millum t.d. hægri fiskaprís, vegna inflatión, og høga rentu og høgan oljukostnað. Fíggjarmálaráðið metir, at betra loysnin er at áseta veiðigjaldið soleiðis, at væl rikin reiðarí hava møguleika at varðveita ein munandi part av avlopinum m.a. til at taka slík sveiggj. Fíggjarmálaráðið metir, sum áður nevnt, at lógaruppskotið ásetur eitt veiðigjald, sum er væl minni enn metta tilfeingisrentan.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið metir at tað er ivasamt, um lógaruppskotið tekur hædd fyri teimum serligu viðurskiftunum, sum gera seg galdandi fyri lodnu.

Fíggjarmálaráðið tekur undir við hesum sjónarmiði og tillagar lógaruppskotið. Miðal avgreiðingarvirðið fyri veiðu av lodnu verður ásett eftir veiðu, sum er landað frá 1. mai til og við 30. apríl árið eftir, og veiðigjaldið fellur til gjaldingar 15. juli á hvørjum ári.